KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 22.05.2014 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245

**Nevndarlimir:** Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen og Atli S. Justinussen

**Varalimir:** Erling Petersen fyri Herfrí J. Sørensen

**Ikki møtt:** Elsebeth M. Gunnleygsdóttur

**Onnur:** Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, skrivari

| Málsyvirlit | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 55/14 | 14/00467 | Farloyvi frá býráðsarbeiðinum, mai 2014 - Herfrí J. Sørensen, býráðslimur |
| 56/14 | 14/00474 | Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll 2013, Klaksvíkar Býráð |
| 57/14 | 11/00134 | Býráðshøll í Metanarhúsinum. |
| 58/14 | 11/00290 | Bussleið í Klaksvíkar Kommunu - longd royndartíð |
| 59/14 | 12/01109 | Uppskot um býarplansbroyting - Minsta grundøkjavídd broytast til 200 $m^2$ í eldri bústaðaøkjum |
| 60/14 | 12/01178 | Vardir bústaðir til fólk við lættari menningartarni - Grundstykkið við Heygavegin latast Búðstøðum/AMR - *fyrra viðgerð* |
| 61/14 | 14/00069 | Nýtt høvuðssæti til Kommunufelagið |
| 62/14 | 14/00450 | Reglugerð um vatnveiting í Klaksvíkar kommunu |
| 63/14 | 14/00202 | Nýggjan lastbil til vegadeildina - *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| 64/14 | 14/00395 | Konta til ráðgeving - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| Eykamál | 13/01064 | Stuðul til tillagingar av Miðstovuni - Norðoya Fornminnasavn |

## 55/14
## 14/00467 Farloyvi frá býráðsarbeiðinum, mai 2014 - Herfrí J. Sørensen, býráðslimur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.05.2014 | 55/14 | |

**Frágreiðing um málið:**

Herfrí J. Sørensen, býráðslimur, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hon verður burturstødd til býráðsfundin 22. mai 2014 og tí ynskir, at fyrsti varalimur floksins fær boð at møta.
Sambært fundarútskrift frá Valnevndini frá 14. nov. 2012 er fyrsti varalimur Fólkafloksins Erling Petersen, og verður hann tí at møta vegna Herfrí J. Sørensen til býráðsfundin 22. mai 2014.

**Lógargrundarlag:**

Kommunustýrislógin (KSL), grein 18, stk. 2:
*Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
KSL, grein 18, stk. 3:
*Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Fundarsamsýning til varalimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**

Mælt verður býráðnum til lata Erling Petersen taka sæti í býráðnum á fundinum 22. mai 2014.

**Samtyktir**

**BýR 22-05-2014:** Einmælt samtykt, og Erling Petersen tók sæti í Býráðnum.

## 56/14
## 14/00474 Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll 2013, Klaksvíkar Býráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2014 | 44/14 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 22.05.2014 | 56/14 | |

**Frágreiðing um málið:**
Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2013.

**Lógargrundarlag:**
- Kommunustýrislógin, grein 53, stk. 2, og
- Kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.til., grein 8.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at góðkenna ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina fyri 2013.

**Samtyktir**
**FíN 20-05-2014:** Nevndin mælir býráðnum til at góðkenna ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina fyri 2013.

**BýR 22-05-2014:** Tilmælið frá FíN 20-05-2014 samtykt, og grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2013 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll góðkendur.

## 57/14
## 11/00134 Býráðshøll í Metanarhúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2014 | 46/14 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 22.05.2014 | 57/14 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til tilmæli frá umsitingini, dagf. 13. mai 2014, har greitt verður frá møguleikanum í framtíðini at halda fundir býráðsins umframt móttøkur, vígslur v.m. í nýggja mentanarhúsinum við Klaksvíksveg 2.

Stýrið fyri Mentanarhúsið í Klaksvík arbeiðir við at orða arbeiðssetning fyri bygginevnd. Spurningurin er, hvørt eitt soljóðandi ískoyti: “Klaksvíkar Býráð, sum í dag húsast í býráðshúsinum á Nólsoyar Pálsgøtu, í framtíðini skal húsast í Mentanarhúsinum við Klaksvíksvegin” skal verða partur av arbeiðssetninginum. Stýrið fyri Mentanarhúsið í Klaksvík hevur tí heitt á borgarstjóran um at fáa hesa orðing lagda fyri býráðið til støðutakan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar fíggjarligar avleiðingar í inniverandi fíggjarárið. Tá ið endalig støða skal takast til, um flutt verður, er talan um, at kommunan skal gera eitt leigumál við grunnin Mentanarhúsið í Klaksvík um leigu av tí partinum av bygninginum, sum skal brúkast til endamálið.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at Fíggjarnevndin tekur undir við, at fylgjandi orðing " Klaksvíkar Býráð, sum í dag húsast í býráðshúsinum á Nólsoyar Pálsgøtu, í framtíðini skal húsast í Mentanarhúsinum við Klaksvíksvegin", verður sett inn í arbeiðssetningin fyri bygginevndina fyri Mentarnarhúsið.

**Samtyktir**
**FíN 20-05-2014:** Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Jóhann Lützen, tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-05-2014. Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Eyðstein Ó. Poulsen, mælir frá, at býráðssalur verður staðsettur í Mentanarhúsinum, og at spurningurin um býráðssal verður tikin upp í samband við bygging av nýggjum býráðshúsi.

**BýR 22-05-2014:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Fíggjarnevndini 20-05-2014 við 6 atkv. fyri (Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen og Kristian Eli Zachariasen), 4 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Eyðstein Ó. Poulsen, Atli S. Justinussen og Erling Petersen), og ongum blonkum atkv.

## 58/14
## 11/00290 Bussleið í Klaksvíkar Kommunu - longd royndartíð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 14.05.2014 | 15/14 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2014 | 49/14 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 22.05.2014 | 58/14 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 1. apríl 2014, ið greiðir frá málinum.
Býráðið hevur sett pening av til eina royndarskipan við eini bussleið í Klaksvíkar Kommunu seinna hálvár 2014. Royndarskipanin skuldi upprunaliga vara eitt hálvt ár. Tað vísir seg nú, at hetta ikki er nóg long til eina royndarskipan; heldur verður mælt til eina royndartíð á hálvtannað ár. Hetta viðførir, at Býráðið má seta neyðuga upphædd av á fíggjarætlanini fyri 2015.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Á fíggjarætlanini fyri 2014 eru 1,7 mió. kr. settar av, til eina royndarskipan í eitt hálvt ár. Hinvegin eru í inniverandi ári niðanfyri standandi játtanir á fíggjarætlan kommununnar til málsøkið fólkaflutningur:

| | |
|---|---|
| Nýggj Bussleið | Kr. 1.700.000,- |
| Serflutningsskipanin | Kr. 283.000,- |
| Skúlin felags, flutningur (skúlanæmingar) | Kr. 420.000,- |
| Samanlagt | Kr. 2.403.000,- |

Í hesum málinum, har talan er um eina royndarskipan, verður ikki lagt upp til at gera broytingar í serflutningsskipanini.

**Tilmæli:**
Umsitingin leggur við hesum upp til, at viðkomandi nevndir og býráð umrøða spurningin:

1. um bussleiðin skal vera ókeypis ella ikki, og
2. um royndarskipanin kann vera í hálvtannað ár, sum veitarin mælir til, og sum er ein treyt fyri, at hann kann útvega hóskandi bussar til endamálið

Hetta merkir, sum upplýst, at býráðið bindur seg til at seta 3,5 mió. kr. av á fíggjarætlanini fyri 2015.

G.G. til kunningar: Verður royndarverkætlanin sett í gongd sambært omanfyri nevnda prinsippi, má málið takast upp aftur í royndartíðini við atliti til, um haldast skal fram við kommunalari bussleið aftaná 2015, og í játtandi føri má spurningurin um avseting í samband við útbjóðing, útvegan av bussskýlum og gerð av busslummum takast upp til viðgerðar.

**Samtyktir**

**TN 14-05-2014:** Nevndin tekur undir við, at royndartíðin verður hálvtannað ár, sum viðførir eina binding á fíggjarætlanini fyri 2015 upp á 3,5 mió. kr. Nevndin mælir til, at bussleiðin verður ókeypis at brúka í royndartíðini.

**FíN 20-05-2014:** Nevndin tekur undir við TN 14-05-2014.

**BýR 22-05-2014:** Tilmælini frá TN 14-05-2014 og FíN 20-05-2014 einmælt samtykt.

## 59/14
## 12/01109 Uppskot um býarplansbroyting - Minsta grundøkjavídd broytast til 200 m$^2$ í eldri bústaðaøkjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 12.05.2014 | 34/14 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 22.05.2014 | 59/14 | |

**Frágreiðing um málið :**

Málið stavar upprunaliga frá okt. 2012 og var seinast kunnað um í avvarðandi nevndum í mars 2013. Arbeiðið við at gjøgnumhyggja øll A-økir í kommununi í samband við minsta mark grundøkjavídd er ikki liðugt enn, og verður spurningurin um at broyta part av A10-økinum sunnanvert Fjósabrekkuna tí – eftir áheitan frá formanninum í UBN – lagdur fyri nevnd og býráð til støðutakan.
Uppleggið fyri hendan partin verður sostatt, at grundøkir kunnu verða niður í 200 m$^2$ til víddar, men at bygging, parkeringskrøv og fráleikakrøv verða tey somu sum higartil.

(Sí viðhefta økisásetingarblað, har broytingin er avmerkt við gulum liti, um málið verður samtykt)



**Lógargrundarlag:**
Býarskipanarlógin

**Tilmæli:**
Sí tekstin omanfyri í ”Frágreiðing um málið”

**Samtyktir**
**UBN 12-05-2014:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting, dagf. 06-05-2014.

**BýR 22-05-2014:** Tilmælið frá UBN 12-05-2014 einmælt samtykt

## 60/14
## 12/01178 Vardir bústaðir til fólk við lættari menningartarni - Grundstykkið við Heygavegin latast Búðstøðum/AMR - *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2014 | 50/14 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð - fyrra viðgerð | 22.05.2014 | 60/14 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð - seinna viðgerð | 19.06.2014 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 15-05-2014.
Vísandi til verkætlanina hjá Bústaðir/AMR um at byggja íbúðir til fólk við menningartarni við Heygavegin í Klaksvík, hevur Klaksvíkar kommuna ognað sær grundøkið á matr. nr. 1463 til endamálið. Keypið er bókað sum íløga hjá kommununu og fíggjað av tøkum peningi. Í samband við at stykkið nú skal latast Bústaðir/AMR, verður handanin bókað sum ein frágongd í ognunum hjá kommununi.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Talan verður um eina frágongd í ognum hjá Klaksvíkar kommunu á 1,6 mió.kr.

**Tilmæli:**
Vísandi til áður gjørdar samtyktir í málinum, verður málið hervið lagt til staðfestingar hjá fíggjarnevnd og býráð.

**Samtyktir**
**FíN 20-05-2014:** Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-05-2014.

**BýR 22-05-2014 *fyrra viðgerð*:** Tilmælið frá FíN 20-05-2014 einmælt samtykt

## 61/14
## 14/00069 Nýtt høvuðssæti til Kommunufelagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2014 | 45/14 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 22.05.2014 | 61/14 | |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi dagf. 14. mai 2014 frá umsitingini verður greitt frá ætlanunum hjá Kommunufelagnum um at byggja nýtt høvuðssæti í Tórshavn.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjarliga avleiðingin verður, at limagjaldið til Kommunufelagið verður 1.569.613 kr. í 2015 og 2016 mótvegis 812.288 kr. í 2014. Talan er sostatt um eina øking á 757.325 kr. árliga í 2015 og 2016 ella tilsamans 1.514.650 kr.

**Tilmæli:**
Heitt verður á Fíggjarnevndina um at taka støðu til málið.

**Samtyktir**
**FíN 20-05-2014:** Vísandi til umrøðuna á fyrsta aðalfundinum um hetta málið, mælir nevndin til at útseta eina møguliga bygging, til Kommunufelagið er komið í eina trygga, fasta legu, og framtíðar virksemið er útgreinað í samstarv við allar kommunur í felagsskapinum.

**BýR 22-05-2014:** Tilmælið frá FíN 20-05-2014 einmælt samtykt.

## 62/14
## 14/00450 Reglugerð um vatnveiting í Klaksvíkar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 14.05.2014 | 19/14 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2014 | 53/14 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 22.05.2014 | 62/14 | |

**Frágreiðing um málið:**
Vatndeild kommununnar hevur heitt á Teknisku Umsiting um at fáa eina reglugerð fyri vatnveiting kommununnar setta í gildi, og hevur Umsitingin tí kannað eftir, hvussu aðrar kommunur stjórna vatnveitingini. Sí viðfest uppskot til reglugerð, sum lýsir ábyrgdarøkið, eftirlit, hvør kann íbindast vatnverkið ókeypis og fyri gjald, tilfarsval, brandpostar o.a.m.

**Lógargrundarlag:**
M.a. lóg nr. 63 dagf. 1. apríl 1909 fyri Føroyar um Vatnleiðingar, Lóg nr. 60 dagf. 24. apríl 1896 um verju av vatnveitingarvirkjum, broytt við lóg nr. 127 dagf. 15. apríl 1930 og kunngerð nr. 127 fra 22. november 2013 um veiting av drekkivatni.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ætlanin er ikki, at málið skal fáa fíggjarligar avleiðingar í 2014, men kunngerð nr. 127 fra 22. november 2013 um veiting av drekkivatni fer uttan iva at føra til, at drekkivatnsveitingin fer at kosta meira á komandi fíggjarætlanum. Umsitingin arbeiðir við einari lýsing av hesum málinum, sum verður lagt fyri viðkomandi nevndir seinni.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við reglugerðini.

**Samtyktir**
**TN 14-05-2014:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU, dagf. 06-05-2014.

**FíN 20-05-2014:** Nevndin tekur undir við TN 14-05-2014.

**BýR 22-05-2014:** Tilmælini frá TN 14-05-2014 og FíN 20-05-2014 einmælt samtykt

## 63/14
## 14/00202 Nýggjan lastbil til vegadeildina - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð - fyrra viðgerð | 24.04.2014 | 48/14 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð - seinna viðgerð | 22.05.2014 | 63/14 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 24. apríl 2014.

**Samtyktir**
UBN 07-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TU, dagfest tann 28-02-2014.

TN 09-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 28-02-2014.

FíN 22-04-2014: Nevndin tekur undir við UBN 07-04-2014 og TN 09-04-2014.

BýR 24-04-2014 *fyrra viðgerð*: Samtykt.

**BýR 22-05-2014 *seinna viðgerð*:** Einmælt samtykt

## 64/14
## 14/00395 Konta til ráðgeving - *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð - fyrra viðgerð | 24.04.2014 | 47/14 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð - seinna viðgerð | 22.05.2014 | 64/14 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 24. apríl 2014.

**Samtyktir**
FíN 22-04-2014: Ein meiriluti í nevndini, Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Signhild V. Johannesen og Eyðstein Ó. Poulsen, tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 16-04-2014, og at peningurin í 2014 í samráð við nevndarformenninar verður nýttur til barna- og ungdómspolitikk og til tilgongdina at skipa eldraøkið, umframt at málið verður tikið uppaftur í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2015.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur støðu í býráðnum.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

BýR 24-04-2014 *fyrra viðgerð*: Tilmælið frá meirilutanum í FíN, dagfest 22-04-2014, samtykt við 9 atkvøðum fyri (JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ, KEZ, EÓP, EMG og HJS) og 2 atkvøðum ímóti (GvK og ASJ).

**BýR 22-05-2014 *seinna viðgerð*:** Tilmælið frá BýR 24-04-2014 samtykt við 8 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen, Kristian E. Zaachariasen, Eyðstein Ó. Poulsen og Erling Petersen) og 2 ímóti (Gunvá við Keldu og Atli S. Justinussen) og ongari blankari atkvøðu.

## Eykamál
## 13/01064 Stuðul til tillagingar av Miðstovuni - Norðoya Fornminnasavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.05.2014 | 31/14 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2014 | 48/14 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 22-05-2014 | eykamál | |

**Frágreiðing um málið:**
Í umsókn frá 28. mars 2014 frá Norðoya Fornminnasavni verður biðið um stuðul til serliga verkætlan, har serliga Miðstovan verður umvæld, og køkur verður gjørdur. Samstundis gera teir vart við, at umráðandi er, um stuðulin verður játtaður, at hesin ikki gongur útyvir árligu stuðulsjáttanina frá kommununi til vanliga raksturin av savninum.

Sambært kostnaðarmetingini, sum Jógvan Andrias Joensen (Leikalund) hevur sett upp fyri Fornminnasavnið, er kostnaðurin:
Kr 30.000,- Fyrireiking og tekniarbeiði
Kr 20.000,- Høvuðsreingering í Miðstovuni
Kr 170.000,- Niðurtøka og uppseting av køki, o.a. arbeiði tengt at hesum
Kr 50.000,- Tilfar til veggir og bjálving
Kr 130.000,- El, hita og rørarbeiði
Kr 400.000,- *er samlaði kostnaður av verkætlanini*

So vítt sum játtanin frá Søvnum Landsins er kend (*havi tosað við Andras Mortensen*), røkkur hon bert til "vanliga raksturin". Í hesum sambandi verður savnsarbeiðið raðfest ovast.
Hetta merkir, at roknast skal ikki við stuðli frá Søvnum Landsins upp á hesa umvæling – kanska bert ein lítil partur.

Umráðandi er tó í sambandi við hesa verkætlanina, at Søvn Landsins eisini góðkennir hana.

**Lógargrundarlag:**
Fíggjarætlanin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avseting til endamálið

**Tilmæli:**
1. at møguligur stuðul til endamálið verður at taka upp í sambandi við viðgerðina av komandi fíggjarætlan
2. at játta kr. 100.000 árliga í fýra ár til serliga verkætlan "*Miðstovuverkætlan*"
3. at Norðoya Fornminnasavn tekur lán til hesa verkætlan, har kommunan samstundis veitir Norðoya Fornminnasavni eina tilsøgn um játtan á kr. 100.000 í fýra ár til hesa serligu verkætlan

4. at áðrenn stuðul verður latin til verkætlanina, verður góðkenning frá Søvnum Landsins at senda kommununi, sum annars skal veita loyvi (byggiloyvi) fyri hesi umvæling
5. at játtanin til hesa serligu verkætlan ikki ávirkar játtanina til vanliga raksturin – o.u. kr. 500.000,- pr. ár.

**MeN 12-05-2014:** Nevndin tekur undir við tilmæli 07.05.14. – pkt. 3, 4 og 5.

**FíN 20-05-2014:** Nevndin tekur undir við MeN 12-05-2014.

**BýR 22-05-2014:**
Tilmælini frá MeN 12-05-2014 og FíN 20-05-2014 einmælt samtykt.